


## Løkke lænir seg til vælferð

– Vi kan ikki låne os til vælfærd!

Soleiðis hevur slagorðið hjá Lars Løkke Rasmussen og donsku stjórnini verið seinastu tíðina. Men júst hetta slagorð hevur danska Ekstra Bladet tikið og vent ímóti forsætisráðharranum sjálvum.

Blaðið hevur hugt í tinglýsingarlistan og sæð, hvussu stór lán forsætisráðharrin hevur í sínum egnu privatum húsum. Hann eigur eini sethús í Græsted, har hann og familjan býr, og eini summarhús í Lalandia í Billund, sum verða leigað út til ferðafólk, sum ferðast í Lalandia, men sum hann eisini sjálvur kann nýta eftir avtalu við Lalandia.

Sambært upplýsingunum, sum Ekstra Bladet hevur fingið fatur á, so skyldar forsætisráðharrin 5,78 milliónir krónur í hesum húsum, hóast tey »bara« eru verd 4,3 milliónir krónur. Harvið kemur blaðið til ta niðurstøðu, at forsætisráharrin er tekniskt insolventur.

Í Ekstrablaðnum í dag skuldsetir blaðið RealkreditDanmark at gera mun á fólki, tí tey hava lænt Lars Løkke Rasmussen meira, enn metingin sigur.

Hvørki Realkredit Danmark ella forsætisráðharrin vilja gera viðmerkingar til Ekstrablaðið, sum speirekur forsætisráðharran við, at hann ikki kann tosa um, at vit onnur »ikki kunnu læna pengar til vælferð«, tá tað er júst tað, hann gerur sum privatpersónur.

# Tingvarpið




Tingmannatala um tingmannatalið

## Í MORGIN




Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av vestri og útsynningi og kavaælingur, men eisini sólglottar. Hitin millumm 1 og 4 stig.

## SUNNUDAGIN




Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi, um kvøldið minni vindur av vestri. Sólglottar, men eisini kavaælingur og hitin millum 1 og 4 stig.

## MÁNADAGIN




Fleyr til gul av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 0 og +3 stig.

**Veðrið týsdagin og mikudagin:**

Týsdagin lot av ymsum ættum og yvirhøvur turt, men mikudagin veksur hann vindin av suðri og møguliga avfall. Hitin millum 0 og 4 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ




**Síðstu nátt:**
Eitt stormlágtrýst, 956 hPa. skamt eystan fyri Føroyar fer í landnyrðing og grynnist.




**Komandi nátt:**
Lágtrýstið skamt sunnan fyri Føroyar fer eystureftir.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 95 mm



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

### Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Nuuk** | -5 | **Tromsø** | -- | **Moskva** | 0 | **Athen** | 14 |
| **Reykjavík** | 2 | **Bergen** | 0 | **Berlin** | 5 | **Beijing** | 0 |
| **Tórshavn** | 4 | **Oslo** | -9 | **Paris** | 13 | **New Dehli** | 19 |
| **Lerwick** | 3 | **Stokkhólm** | -4 | **Madrid** | 8 | **Bangkok** | 31 |
| **Aberdeen** | 4 | **Keypmannah.** | 0 | **Róm** | 13 | **Sydney** | -- |
| **London** | 13 | **Helsinki** | -6 | **Malorca** | 16 | **New York** | 0 |

## VESTFALLSKYRRINDI

3. febr. Tendring
6. febr. Mánin longst frá jørðini
11. febr. Fyrra kvarter

Kelda. Álmanakkin 2011

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 4. feb. | 07:36 | 19:56 | 06:36 | 18:56 | 06:51 | 19:11 | 09:36 | 21:56 | 10:36 | 22:56 | 05:51 | 18:11 | 04:51 | 17:11 | 07:51 | 20:11 | 08:51 | 21:11 | 07:21 | 19:41 | 08:36 | 20:56 |
| 5. feb. | 08:16 | 20:34 | 07:16 | 19:34 | 07:31 | 19:49 | 10:16 | 22:34 | 11:16 | 23:34 | 06:31 | 18:49 | 05:31 | 17:49 | 08:31 | 20:49 | 09:31 | 21:49 | 08:01 | 20:19 | 09:16 | 21:34 |
| 6. feb. | 08:53 | 21:11 | 07:53 | 20:11 | 08:08 | 20:26 | 10:53 | 23:11 | 11:53 | - | 07:08 | 19:26 | 06:08 | 18:26 | 09:08 | 21:26 | 10:08 | 22:26 | 08:38 | 20:56 | 09:53 | 22:11 |
| 7. feb. | 09:29 | 21:46 | 08:29 | 20:46 | 08:44 | 21:01 | 11:29 | 23:46 | 00:11 | 12:29 | 07:44 | 20:01 | 06:44 | 19:01 | 09:44 | 22:01 | 10:44 | 23:01 | 09:14 | 21:31 | 10:29 | 22:46 |
| 8. feb. | 10:03 | 22:22 | 09:03 | 21:22 | 09:18 | 21:37 | - | 12:03 | 00:46 | 13:03 | 08:18 | 20:37 | 07:18 | 19:37 | 10:18 | 22:37 | 11:18 | 23:37 | 09:48 | 22:07 | 11:03 | 23:22 |